# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyar eitt valdømi – tora vit tað?

Tað eru nógv argument fyri at gera Føroyar til eitt valdømi. Ikki minst nú, tá verandi valskipan ikki hóskar til fólkatalið í dag, men heldur til fólkatalið, sum tað var fyri næstan 30 árum síðani.

Fyrimunir við einum valdømi kunnu hugsast at vera sjónligari floksprofilering og meiri dent á landsdekkandi mál, heldur enn lokal einkultmál, sum mangan dominera dagsskránna í teimum einstøku valdømunum.

Vansarnir kunnu tó vera, at útjaðarin verður gloymdur til frama fyri einum politikki, sum bert hóskar til miðstaðarøkið. Ein annar vandi kann vera, at útjaðarin verður nýttur sum ruskílat til projekt, sum ein stórur meiriluti ikki vil hava í sínum grannalagi.

Taka vit Tórshavnar Kommunu sum dømi um, hvat hendir, tá smærri øki verða løgd saman við einum størri øki, so er tað við til at undirminera trúnna uppá Føroyar sum eitt valdømi. Tórshavnar Kommuna forsømir heilar bygdir í kommununi við ongari útstykking, sum støðan hevur verið í Kollafirði síðani Tórshavnar Kommuna yvirtók bygdina fyri árum síðani, hóast fólkatalið í bygdini liggur um 1.000 fólk, og langur bíðilisti er til grundstykkir. Harafturat leggur Tórshavnar Kommuna ein tungan ídnaðaraktivitet innast í sama fjør við einari lokalt óynsktari bingjuhavn. Framferðin er serliga margháttlig, tí Tórshavnar Kommuna marknaðarførir seg sjálva sum eina kommunu, har nærumhvørvið hevur høgan prioritet. Man setur hundalortastativ upp í Havnini, meðan man samstundis, hóast lokal mótmæli, leggur tíggjutúsundtals fermetrar undir betong og asfalt 20 km longur norðuri. Nú kemur tunnil millum Tórshavnar Kommunu og Skálafjørðin. Hví ikki hugsa langsiktað og brúka framúr góðu umstøðurnar í Runavík til framtíðar bingjutrafikkin! Hví hugsa vit ikki um landsplanlegging? Hví neyðtaka reina og vakra náttúru, tá vit longu hava eina frálíka havn við Skálafjørðin? Hví gera dupultíløgur? Nýggja tunnilsætlanin eigur at steðga bingjuhavnini í Kollafirði.

Um Føroyar sum eitt valdømi bleiv rikið sum Tórshavnar Kommuna, so hevði tað verið ein vanlukka fyri útjaðarøkini. Hvussu kunnu vit stóla uppá, at Føroya land sum eitt valdømi, ikki verður rikið sum Tórshavnar Kommuna, har man í yvirførdum týdningi hevur luksustiltøk sum blomsturkassar og hundalortastativ í miðstaðarøkinum, meðan bygdaøkini fáa tann aktivitet, sum man ikki vil síggja í Havn?

Nú er sjálvandi ikki vist, at landspolitikarar bera seg at sum verandi lokalpolitikarar í Tórshavnar Kommunu, men tora vit at at hava álit á tí?

**Sosialurin**

## Nær fer Sunnleif Rasmussen at siga nakað positivt?

FRÍÐÁLVUR JENSEN



**- tað er fínt við tónleikaligum kritikki, men tað er so avgjørt neyðugt, at kritikkurin er konstruktivur og objektivur**

Havi nakrar ferðir sitið og lurta eftir seinnapartsendingini hjá ÚF, og er tað hugvekjandi at lurta, tá okkara stóra tónaskald trínur fram við síni meting um føroyska tónleikin.

At vit eru vitni til undirbráttligheit kemur so sanniliga til sjóndar, tá stóri, men kortini lítli, maðurin trínur fram, og gevur sína meting um ymsu útgávurnar.

Eg havi so ongantíð hoyrt hann siga nakað positivt um nakra av teimum!

Eitt kann eg siga tær Sunnleif, at tað er yvirhøvur ikki serliga stuttligt at vera popp- og rokktóneikari, um tað er tú sum skal geva tína meting um avrikið!

Kom nú eitt sindur víðari – vit eru ymisk og hava ymisk sjónarmið, so objektiva metingin er ein dygd í kritikkinum.

At sita og biðja um hvat er farið fram á innan føroyskan tónleik, meðan tú sjálvur gekk niðri í Danmark, er sera grunt og stingur ikki serliga djúpt í tí, sum er farið fram á føroyska tónleikapallinum – seinnu árini.

Í seinastu sendingini var tann fyrsti sera positivur um avrikið á fløguni, sum var til umrøðu, men tá tann "stóri" hevði lagt sína tónleikaligu hond á, misti hesin líkasum luftina, og tá alt kom til stykkis, var talan um eina "lorta" útgávu.

Tað er fínt, at altjóðagerðin verður tikin inn í føroyska tónleikin, men vit skulu sanniliga ansa okkum, at vit ikki missa okkara føroyska samleika, og at vit geva teimum rúmd, sum veruliga royna at gera okkurt - frameftir.

**"Hasin á Tvøroyri.."**

Arroganti fírurin av Sandi kom so við síni meting - at "hasin á Tvøroyri.." nú var farin undir at fáa sær altjóða dám, so hann ivaleyst kann passa inn í tónleikaliga trongskygnið hjá heimasandsmanninum.

Eg áni ikki, um harra Sunnleif Rasmussen veit, at tað eru ávísir lurtarar og listafólk, sum kundu fingið ástoyt av tí, hann førir fram, og um hann yvirhøvur leggur nakað í, hvat hesi halda um hansara metingar.

Tú er ikki einhvør – MINST TIL TAÐ - Sunnleif!

## Gjaldið um Vágatunnilin eigur at fara niður við 20%

JÓANIS NIELSEN
www.joanisnielsen.fo



Nú løgtingið hevur játtað at gjalda kr. 2,7 mill. av rakstratútreiðslunum av Vágatunnlinum, eigur gjaldið at fara munandi niður. Seinast ein regulering varð gjørd, vóru tað teir stóru bilarnir, sum sluppu við at gjalda 30% minni, tí haldi eg, at nú eiga teir minnu bilarnir at fáa áðgóðan, mín metan er, at ein lækking uppá 20% fyri teir minnu bilarnar, saktans hevði kunnað verið gjøgnumførd, nú landskassin yvirtekur part av rakstrarútreiðslunum. Tey, ið hava mánaðarkort og t.d. gjalda kr. 1.000,-, høvdu tá sloppið við kr. 800,- um mánaðan, gjaldið fyri ein vanligan persónbil, uttan avsláttur, hevði tá komi at verið kr. 135,- fyri ein túr aftur og fram. Ein lækking uppá 20% hevði ført við sær, at ferðslan hevði komið at verðið munandi størri, og harvið eisini meira inntøkur. Spennandi verður, hvat niðurstøðan hjá nevndini verður.

## Viðmerking til Regin Eikhólm, odontolog v.m.

Av tí at í umbúna er at geva *Ó-/ søgur um djevulskap* útaftur í nýggjum upplagi (við ymsum rættingum) skulu tygum fyri málsligu ábending tygara í 41. reglu í grein í Sosialinum 11. januar í. h. á. eiga hesi fáu takkarorð:

Hoyr tú væni danimann,
sum væl at lesa bøkur kann
og einki ert eitt málsigt kloss,
men fróður við um tenn og ross;
"á rossum" so víst tað íslendskt er
sum *skyr* og *baugur* og *jarðarber*,
so fyri handa lítla sting tú stakk,
góði Eikhólm, túsund takk.

CARL JÓHAN JENSEN



Í Havn 15. januar tjúguhundrað og sjey

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.